Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 03.06.2026
Mál nr.: 25/21706
Málsviðgjørt: SR

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 1. Øll mál og málsøki eftir lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka eru yvirtikin, sbr. tó stk. 2. *Stk. 2.* Undantikin eru hesi mál og málsøki: 1-6) ... 7) Heilsumál, læknar, jarðarmøður, sjúkrahús, tó ikki farsóttarmálsøkið.	**§ 1** Í løgtingslóg nr. 41 frá 10. mai 2006 um ræði á málum og málsøkjum (Ræðislógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 16. mai 2024, verður § 1, stk. 2, nr. 7 orðað soleiðis: "7) Heilsumál, læknar, jarðarmøður, sjúkrahús, tó ikki: a) Farsóttir. b) Rúsandi evni."
	§ 2 Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2027.